## Fyribilsstarv

### Lastbilamekanikari til bilverkstaðið

Í sambandi við farloyvi verður hervið søkt eftir lastbilamekanikara at byrja skjótast gjørligt og fram til 30. september 2000.

**Arbeiðsuppgávurnar á bilverkstaðnum**

Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni, sum hevur 15 stórar lastbilar, 9 stórar bussar, 8 vørubilar og annan útbúnað.

Á bilverkstaðnum eru íalt 8 fólk:

1 leiðari, 4 lastbilamekanikarar, 1 goymlsuvørður og 2 lærlingar

Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Gera ætlanir um størri viðlíkahaldsarbeiði
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Starvið fevnir um**

Lastbilamekanikarin skal verða við til at tryggja, at koyriútbúnaðurin er í so góðum standi sum gjørligt, og at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá lastbilamekanikaranum eru at vera við til at:

- Tryggja at trygdin á øllum koyriútbúnaðinum er í samsvari við formlig og teknisk krøv
- Leypandi meta um viðlíkahaldstørvin á koyriútbúnaðinum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vanligt dagligt viðlíkahald á øllum lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði

**Førleikakrøv**

- Lastbilamekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Koyrikort til trailara
- Prógv í sveising
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki til formlig krøv og royndir viðvíkjandi rakstri av lastbilum og bussum
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi arbeiðshátti á bilverkstøðum
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og er starvið lønt í lønarflokki 13.

**Umsóknir**

Áhugaðir lastbilamekanikarar skulu senda umsókn til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 20. januar 2000.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, leiðara á bilverkstaðnum tlf. 34 30 00 lokal 146, ella e-post: hem@ssl.fo

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Broyting í upplatingartíðunum á posthúsunum í SMS og í miðbýnum í Tórshavn

Frá mánadegnum 17. januar 2000 verða upplatingartíðirnar á posthúsunum í SMS og í miðbýnum hesar:

Mánadag til mikudag 10.00 til 16.00
hósdag og fríggjadag 10.00 til 17.00

Postverk Føroya

## Frá Hotel Föroyum

Tilboð ynskist at hampa um grótgarðin á ognini hjá Hotel Föroyum.

Áhugaðir biðjast seta seg í samband við

Hotel Föroyar **** Best Western

**Tlf. 317500**

## Kunngerð

**Tórshavnar býráð hevur í ár 2000 fastan fund hesar hósdagar, kl. 18.00:**

27. januar
17. februar
9. mars
6. apríl
4. mai
25. mai
22. juni
7. september
5. oktober
2. november
23. november
14. desember

*Tórshavnar býráð*

Fíggjarmálastýrið
**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

## Deildarstjóri

Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya søkir eftir deildarstjóra til avbjóðandi starv at byrja 1. mars 2000 ella so skjótt til ber.

**Starvsstaður:** Lógardeildin í Stýrinum.

**Útbúgving:** Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum løgfrøðingur ella líknandi útbúgving.

**Arbeiðsuppgávur:** Lógardeildin hevur m.a. hesar uppgávur:
- Málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll og onnur avgjaldsumráði,
- innheintingarmál,
- ráðgevi hjá Toll- og Skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsitingarumráði stovnins,
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum,
- at gera ummælir í kærumálum og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalstýrið og Landsstýrið, og virkar sum ráðgevi hjá økjunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Á lógareildini eru størv til 4 akademikarar og 3 málsviðgerar.

**Setanartreytir:** Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, og er tað lønt sum deildarleiðarastarv. Tað er av týdningi, at tann, sum settur verður, hevur royndir og góð samstarvsevni.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið:** Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til stjórnina í Stýrinum, tlf. 35 20 26.

**Umsóknir:** Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postboks 2151
FO-165 Argir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur hjá landinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, sum heldur til á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin.

## Spurnablaðskanning

um framtíðar ynskiligt bústaðarmynstur

Vísandi til at Húsalánsgrunnurin fyrst í desember 1999 sendi út spurnabløð fyri at kanna tørvin á einum framtíðar ynskiligum bústaðarmynstri, undir heitinum eldrabústaðir, verður sagt frá at møguleiki er fyri at svara hesa vikuna afturat, og verður innlatingarfreistin sostatt sett til 10. januar 2000.

**Húsalánsgrunnurin**

## Frá Hotel Föroyum

Tilboð ynskist at innhegna ognina hjá Hotel Föroyum og gerð av rulluportri við omankoyringina frá Oyggjarvegnum.

Áhugaðir biðjast seta seg í samband við

Hotel Föroyar **** Best Western

**Tlf. 317500**

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**

## Skrivari

**Starv á Føroya Gjaldstovu**
sum skrivari hjá stjóra/stjórn er leyst at søkja til setanar beinanvegin:

**Ábyrgdarøki:**
- Samskifti
- Journal
- Bókhald stovnsins

**Av uppgávum kunnu nevnast:**
- Avgreiða telefon, kalendara og røkja skrivarauppgávurnar hjá stjórnini
- Skipa journal og taka móti posti
- Avgreiða skjøl hjá stovninum til bókingar og stemma av
- Fyrireika fundir
- Viðlíkahalda skriv, formalar o.t. á intra-/internetinum

**Útbúgving og krøv til viðkomandi, ið verður sett/-ur:**

Viðkomandi, ið settur verður
- skal duga væl at skriva rætt føroyskt
- skal hava ástøðiligan kunnleika innan fyrisiting og roknskap
- skal verða førur fyri at átaka sær uppgávur fyri leiðsluna
- skal helst hava royndir sum skrivari
- skal helst hava kunnleika til journalisering

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu vera Føroya Gjaldstovu í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Leif Abrahamsen, stjóra.

**Á gjaldstovuni starvast umleið 30 starvsfólk. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.**

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

## Søkt verður eftir lærara til Træ-deild skúlans

Søkt verður eftir lærara til træ-deildina. Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður at seta sum skjótast.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiður og hava minst 2-ára starvsroyndir í hesum yrki. Fyrimunur er at hava víðari útbúgving.

Lønin verður samb. sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlan á tlf. 311957.

Umsóknir til starvið skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. januar 2000. Við umsóknini skal fylgja avrit av próvskjølum og møguligar starvsváttanir. Umsóknin skal merkjast »lærari til Trædeildina«.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239,
FO-110 Tórshavn

## Umlættingarfamilja

Barnaverndarnevndin í Tórshavnar kommunu søkir eftir familju í høvuðsstaðarøkinum at taka tvær gentur 7 og 10 ára gamlar til umlætting í vikuskiftum og eftir tørvi.

Umráðandi er, at familjan, ið sett verður, er vælvirkandi og kann samstarva við foreldur og barnavernd.

Nærri fæst at vita, við at ringja á sosialu deild Tórshavnar býráðs tlf. 31 51 60 og tosa við Onnu-Kari Thomsen ella Selmu Ellingsgaard.

Umsóknirnar skulu stílast til: Tórshavnar kommuna, Barnaverndin, postrúm 32, 110 Tórshavn.

*Tórshavnar kommuna*

## Aðalfundur

Umboðsráðið boðar til aðalfundar í B36 húsinum

<u>**leygardagin 19. feb. 2000**</u>
<u>**- kl. 13.00**</u>

Dagskrá samb. lógum felagsins.
Uppskot, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera send Føroya Pedagogfelag att. Umboðsráðið - í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin - t.e. leygardagin 5. februar.

**Umboðsráðið Føroya Pedagogfelag**

## Starvsfólk til Bókhaldið

**Bókhaldið**

Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. februar ella skjótast gjørligt.
Í Bókhaldinum starvast 4 fólk. Høvuðsuppgávurnar í Bókhaldinum eru ognara-, lønar- og fíggjarbókhald.

Tann, sum settur verður, kemur í fyrstu atløgu at starvast við ognarabókhaldi, men má rokna við at luttaka í øðrum uppgávum í Bókhaldinum, tá á stendur. Talan er um avbjóðandi starv í einum mennandi umhvørvi í støðugari broyting.

**Tín førleiki:**
Tú skalt hava skrivstovu-, peningastovna- ella aðra líknandi útbúgving og hollar royndir í hesum yrki. Eisini er ein fyrimunur, um tú hevur
- førleika viðv. EDV (á brúkarastigi)
- skúla t.d. merkonom, HH ella aðra við -komandi útbúgving
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýrini, deildarleiðara, lokal 3205 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000.

Umsóknir skulu sendast til
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355